## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið fram til mikumorgunin**
Turrveður við sólarglottum, og landsynningur, 3 til 10 m/s, sum seinni hækkar í ein eystan. Í kvøld mest skýggjað veður og í nátt regn av og á. Hitin í nátt um 9 stig.




**Veðrið mikudagin**
Yvirskýggjað og regn. Vindur av landnyrðingi, 5 til 10 m/s, sum út á dagin hækkar í ein norðan. Um náttina skiftandi skýloft við ælaveðri og høgættarvindi, 3 til 8 m/s. Hitin alt samdøgrið millum 8 og 13 stig.




**Veðri hósdagin og fríggjadagin**
Skiftandi skýloft við ælaveðri, seinni mest turrveður og hann klárar í. Vindur av útnyrðingi, 5 til 10 m/s, sum so líðandi lækkar í ein útsynning. Hitin millum 8 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin**
Skýggjað og lágættarvindur, undir 6 m/s. Um náttina skýggjað við regni av og á. Hitin millum 10 og 13 stig.

# Úr Connecticut til Kaldbak

**Í gjár stóð Pauli Nolsøe í Vágsbotni og seldi havhest til svangar havnamenn. Hann býr í USA, men flytir skjótt aftur til Føroya**

*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Sólin sær og tað luktar av havhesti í Vágsbotni. Pauli Nolsøe úr Kaldbak selir nátar, sum hann tók saman við beiggjum sínum leygardagin. Nógv fólk steðgar á, og keypir sær eitt kók og prátar í sólskininum.

Pauli er heima í Føroyum í summarferiu, hann býr í Connecticut í USA. Har hevur hann búð í trý ár, tí kona hansara er haðani.

- Eg møtti henni umborð á læknaskipinum Anastasis í Afrika, har vit bæði sigldu við. Eg var dekkari og hon arbeiddi við samskifti.

Tá tey fóru í land aftur, fluttu tey til USA. Har hevur Pauli siglt við einum trolara og nú arbeiðir hann sum timburmaður.

- Men vit flyta heim til Føroya í januar, tað hevur alla-tíðina verið ætlanin at flyta heimaftur.

Konan hevur verið og vitja í Føroyum tvær ferðir og henni dámar sera væl.

- Mær dámar eisini væl í USA, har er gott at vera, men ikki líka gott sum heima, greiðir Pauli frá.

Pauli er í summarferiu í seks vikur, hann hevur brúkt nakað av tíðini eftir havhesti saman við beiggjunum. Størsti parturin av frítíðini er tó farin við at gera íbúðina í Kaldbak klára, til tá hann saman við konuni og dóttrini Honnu Silju flytur aftur til heimbygdina.




*- Mær dámar væl í USA, har er gott at vera, men ikki líka gott sum heima, sigur Pauli Nolsøe, sum býr í Connecticut.*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | 7 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | -- |
| Lerwick | 12 |
| Aberdeen | 14 |
| London | 17 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 18 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 19 |
| Keypmannah. | 15 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 13 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 12 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 31 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 30 |
| Athen | -- |
| Malta | 26 |
| Tunis | 30 |
| Beijing | 25 |
| New Dehli | 31 |
| Bangkok | 29 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 17 |
| New York | 21 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 23 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, umleið 990 hPa, í ein landsynning úr Finnlandi flytur seg eystureftir og ein hátrýstsryggur, 1020 hPa yvir vestara parti av Norðsjónum ferðast í ein landsynning.. Eitt annað lágtrýst, 1010 hPa vestan fyri Bretsku oyggjarnar ferðast




í ein landnyrðing og fer í nátt norður um Skotland.
Hetta gevur okkum fyrst sólarglottar við lítlum loti av landsynningi, sum seinni hækkar í ein eystan. Hitin í dag millum 9 og 14 stig, Um náttin hækkar hann í ein landnyrðing. Hitin í nátt um 9 stig.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 2/9 kl. $06^{00}$– 3/9. $06^{00}$. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í september: 0,2° - Mesti hiti máldur í september: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 2/9 kl. $06^{00}$– 3/9 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í september: 0,0 mm

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI

Sosialurin




## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 31. august | Fyrra kvarter |
| 8. september | Mánin næstur jørðini |
| 26. august | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. Sept | 04.18 | 16.45 | 03.18 | 15.45 | 03.33 | 16.00 | 06.18 | 18.45 | 07.18 | 19.45 | 02.33 | 15.00 | 01.33 | 14.00 | 04.33 | 17.00 | 05.33 | 18.00 | 04.03 | 16.30 | 05.18 | 17.45 |
| 5. Sept | 05.12 | 17.37 | 04.12 | 16.37 | 04.27 | 16.52 | 07.12 | 19.37 | 08.12 | 20.37 | 03.27 | 15.52 | 02.27 | 14.52 | 05.27 | 17.52 | 06.27 | 18.52 | 04.57 | 17.22 | 06.12 | 18.37 |
| 6. Sept | 06.03 | 18.25 | 05.03 | 17.25 | 05.18 | 17.40 | 08.03 | 20.25 | 09.03 | 21.25 | 04.18 | 16.40 | 03.18 | 15.40 | 06.18 | 18.40 | 07.18 | 19.40 | 05.48 | 18.10 | 07.03 | 19.25 |
| 7. Sept | 06.47 | 19.11 | 05.47 | 18.11 | 06.02 | 18.26 | 08.47 | 21.11 | 09.47 | 22.11 | 05.02 | 17.26 | 04.02 | 16.26 | 07.02 | 19.26 | 08.02 | 20.26 | 06.32 | 18.56 | 07.47 | 20.11 |
| 8. Sept | 07.35 | 19.59 | 06.35 | 18.59 | 06.50 | 19.14 | 09.35 | 21.59 | 10.35 | 22.59 | 05.50 | 18.14 | 04.50 | 17.14 | 07.50 | 20.14 | 08.50 | 21.14 | 07.20 | 19.44 | 08.35 | 20.59 |

5 707265 100036 >